## Valskelti niðurtikin

Vegadeildin hjá Tórshavnar Býráð hevur tikið fleiri plakatir niður, sum vóru til ampa fyri ferðslutrygdina. Talan var um plakatir, sum krógvaðu ferðsluskilti, serliga í rundkoyringum, men eisini í miðrabattini við SMS. Vakthavandi á politistøðini sigur, at talan bert var um smávegis trupulleikar, har plakatir tóku útsýnið frá ferðsluskiltum, og at hetta vóru plakatir frá øllum flokkum. Av vegadeildini hjá Tórshavnar kommunu vátta tey, at tey – eftir áheitan frá løgregluni – hava tikið fleiri plakatir niður, og at tey ikki av sínum eintingum ganga runt og kanna, um plakatir eru til ampa fyri ferðsluna. Men tá tey fáa áheitan frá løgregluni, taka tey plakatir niður.



## Skal geva yvirskot

Íslendska felagið Baugur Group seldi í gjár meirilutan í donsku Nyhedsavisen, soleiðis at Morten Lund nú eigur 51 prosent av Dagsbrun Media, sum gevur blaðið út. Baugur Group er framvegis minnilutaeigari. Berlingske Tidende skrivar, at nýggi eigarin ætlar at økja lesaratalið úr 540.000 í 800.000 og at tvífalda inntøkurnar av lýsingum. Í fjør hevði Nyhedsavisen 420 mió. krónur í halli, men ætlanin er at venda tí til yvirskot longu í heyst.

Regin Reinert, hagfrøðingur:

# Veljarakanningar geva eina góða støðumynd

**- Tað er einki rationelt argument fyri at banna veljarakanningum í døgunum undan einum vali. Ein veljarakanning er ein støðumynd av tí politiska landslagnum, og tað ber til at síggja eina ávísa gongd í valstríðnum við at kanna veljarakanningarnar, sum verða gjørdar ígjøgnum valstríðið. Tað er eingin orsøk til at dylja hesar støðumyndir fyri veljaranum, heldur Regin Reinert, hagfrøðingur**



*Regin Reinert, hagfrøðingur, fer at fylgja við valinum fyri Rás 2 og Sosialin, og hann fer at gera prognosur – bæði uppá flokkar og persónar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

VELJARAKANNINGAR
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Í Frankaríki hava myndugleikarnir gjørt av, at tað er ikki loyvi at almannakunngera veljarakanningar 24 tímar, áðrenn valhølini lata upp. Hendan lógin kom í gildi í 2002, men frá 1977 var tað ólógligt at kunngera veljarakanningar eina viku undan valinum í Fraklandi.

Grundgevingin fyri hesum banni er at forða fyri, at kanningarnar ávirka veljaran, tá hann skal seta sín kross. Røddir hava eisini verið frammi í Føroyum um at banna veljarakanningum í døgunum undan valinum.

Regin Reinert, hagfrøðingur, dugir tó ikki at síggja nakra haldgóða grundgeving fyri at banna slíkum kanningum.

- Eg dugi ikki at síggja nakra rationella grundgeving fyri at banna veljarakanningum, tí tað eru eingi eintýdd prógv fyri, at ella hvussu veljarakanningar ávirka veljaran. Vit skulu hava í huga, at ein veljarakanning fyrst og fremst er ein støðumynd, og hon kann geva veljaranum, um hann hevur hug at atkvøða taktiskt, møguleika at vita hvar hann stendur, tá hann fer á val, sigur Regin Reinert, sum ikki dugir at síggja trupulleikan í tí, at ein veljari hevur fleiri informatiónir at fyrihalda seg til, tá hann setur tann endaliga krossin.

### Ávirkan báðar vegir

Men hvussu kann ein veljarakanning ávirka veljaran?

- Man kann ímynda sær, at veljarakanningar ávirka valúrslitið, av tí at veljarar velja taktiskt, tá teir vita, hvussu úrslitið sær út. Um ein flokkur ikki klárar sperrumarkið, kann tað hugsast, at veljarin kemur við sympati-atkvøðum fyri at bjarga einum flokki. Hinvegin kann tað hugsast, at um ein flokkur stendur seg væl í veljarakanningum, vilja veljarar vera við á vinnaraliðnum, soleiðis at ein flokkur fer at klára seg enn betri, enn frammanundan spátt, sigur Regin Reinert, sum ger greitt, at eingi endalig prógv eru fyri, hvussu ein veljarakanning kann ávirka veljaraskaran.

Hann vísir á, at kanningar hava verið gjørdar av hesum fyribrigdinum í Danmark, har veljarar verða spurdir um teir lata seg ávirka av veljarakanningum, men sera fáir veljarar vilja vera við, at teir lata seg ávirka av veljarakanningum. Hann er tó greiður yvir, at fólk sjáldan vilja viðurkenna, at tey lata seg ávirka av slíkum kanningum.

Eitt klassiskt dømi, sum ofta verður tikið fram, er valið í Bretlandi í 1992. Labour stóð til at vinna stórsigur við Neil Kinnock (verfaðir Helle Thorning-Schmidt) á odda, men tá avtornaði fór John Major púra óvæntað avstað við sigrinum.

Regin Reinert vísir á, at í Onglandi hevur tað ofta verið so, at tann flokkurin, sum stóð seg best í veljarakanningum, endaði við at fáa færri atkvøður, enn veljarakanningarnar spáddu.

### Ójavnar kanningar

Uppundir hetta valið hava kanningarnar víst sera ójøvn úrslit fyri ávísar flokkar, og t.d. hevur fingið millum seks og níggju tinglimir í teimum fýra kanningunum. Spurningurin er, hvussu tað kann vera, at kanningarnar svinga so nógv.

- Ein veljarakanning er ikki eitt úrslit í sær sjálvum. Tað er ein kanning, har man hevur spurt tilvildarlig fólk, og tað kann sjálvandi vera ymiskt, hvørjum man fær fatur í frá einari kanning til eina aðra, sigur Regin Reinert.

Hann vísir á, at allar kanningar hava eina ávísa hagfrøðiliga óvissu. Typiskt er óvissan pluss ella minus tvey prosent.

- Allar kanningar í Føroyum hava víst, at Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin fara at hava hampuliga stóra framgongd, og tí er lítið at taka seg aftur í, at hesir báðir flokkar fara at taka seg fram á valinum í morgin, sigur Regin Reinert.

- Úrslitið hjá Tjóðveldi hevur hinvegin verið eitt sindur upp og niður í veljarakanningunum hesuferð, og tað kann vera tann statistiska óvissan, sum ger seg galdandi. Um ein kanning rakar tvey prosent lægri, og ein onnur rakar tvey prosent hægri, enn hon skuldi, so gevur tað fýra prosent tilsamans. Tað er rættiliga ósannlíkt, at man rakar fýra prosent við síðuna av í tveimum kanningum, sum eru gjørdar um somu tíð.

- Harafturat kemur tann sannroynd, at ein veljarakanning er ein støðumynd, sum kann broytast í valstríðnum. Seinasta val sóu vit, at Sambandsflokkurin stóð seg ómetaliga væl í veljarakanningum undan valinum, men hann hevði síðani eina javna afturgongd uppundir valdagin, og har var eingin ivi um, at nakrir veljarar rýmdu frá Sambandsflokkinum í teimum síðstu døgunum undan valinum, sigur Regin Reinert.

Regin Reinert vísir at enda á, at hann ikki dugir at síggja trupulleikan við at almannakunngera veljarakanningar í vikuni undan valinum.

- Latið okkum ímynda okkum at veljarakanningar eru við til at ávirka veljaran, tá ið hann fer á val. Er tað so ein trupulleiki? Veljarakanningar eru bert eitt av óteljandi inntrykkum, sum veljarin fær undir einum valstríði. Veljarakanningar fáa veljaran til at hugsa um, hví nakrir flokkar klára seg væl og aðrir klára seg illa og eru harvið við til at fáa veljarar til at seta seg meira inn í politikkin í valstríðnum, sigur Regin Reinert um kjakið at banna veljarakanningum

**Í alt 5 veljarakanningar blivu gjørdar undan valinum (talva 1).**

| *Dato* | 16-12-03 | 15-01-04 | 18-01-04 | 11-01-04 | 15-01-04 | 20-01-04 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Stovnur* | Gallup | Gallup | Gallup | Fynd | Fynd | Val |
| *Tal av interviewum* | 510 | 535 | 532 | 2 800 | 1050 | |
| *Fólkaflokkurin* | 21,1 (+0,5) | 21,9 (+1,3) | 20,8 (+0,2) | 19,8 (-0,8) | 19,3 (-1,3) | 20,6 |
| *Sambandsflokkurin* | 29,7 (+6,0) | 27,2 (+3,5) | 26,1 (+2,4) | 28,5 (+4,8) | 29,0 (+5,3) | 23,7 |
| *Javnaðarflokkurin* | 20,6 (-1,2) | 20,8 (-1,0) | 22,3 (+0,5) | 22,1 (+0,3) | 21,5 (-0,3) | 21,8 |
| *Sjálvstýrisflokkurin* | 4,3 (-0,3) | 3,5 (-1,1) | 3,2 (-1,4) | 3,9 (-0,7) | 4,1 (-0,5) | 4,6 |
| *Tjóðveldisflokkurin* | 19,4 (-2,3) | 20,2 (-1,5) | 22,1 (+0,4) | 19,4 (-2,3) | 20,6 (-1,1) | 21,7 |
| *Miðflokkurin* | 4,9 (-0,3) | 4,9 (-0,3) | 4,3 (-0,9) | 4,1 (-1,1) | 4,4 (-0,8) | 5,2 |
| *Hin Stuttligi Flokkurin* | | 1,5 (-0,8) | 1,2 (-1,1) | 2,1 (-0,2) | 1,1 (-1,2) | 2,3 |
| *Frávik í alt* | 12,9 | 9,5 | 6,9 | 10,2 | 10,5 | |

*Talva 1. Veljarakanningar undan løgtingsvalinum 20/1-2004. Frávikið í mun til endaliga úrslitið stendur í klombrum. Síðsta reglan vísir frávik í alt. Kanningin ið rakti nærmast við endaliga úrslitið er kanningin, sum Gallup og Útvarpið kunngjørdu tveir dagar undan valinum. Hendan talvan varð prentað í Fregnum eftir valið í 2004.*